

*Vilmund er tyrlumekanikari, og umborð á Octopus hevur tvær tyrlur umborð við hvør sínari hangar. Tí siglir hálvi føroyingurin ofta við størsta stuttleikabátinum hjá Paul Allen*



*Sjálvandi er bæði svimjihylur og gosbað umborð á luksusbátinum*

# Í starvi heimsi

**Systkinabarnið, Vilmund Boggs, er tyrlumekanikari og starvast fyri ein av heimsins ríkastu monnum. Talan er um sjálvan Paul Allen, sum í sínari tíð stovnaði Microsoft saman við enn meiri navnframa Bill Gates**



*Octopuss er 126 metrar langur, bygdur í Kiel í Týsklandi og er alment sagdur at kosta 1,1 milliard krónur. Men Vilmund sigur prísin liggja nærri 2,6 milliardum*

## Arbeiðslív

**Leo Poulsen**
blaðmaður
leo@sosialurin.fo

Tá eg lendi út við klokkan fimm hendan fríggjadagin í Seattle – snøggliga ein tíma eftir, at eg var farin á flog úr Kastrup – visti eg bara, at øll trý systkinabørnini vóru heima, og at Vilmund skuldi royna at fáa frí hesar dagarnar, eg var í USA.

Tað vísti seg, at hann var lendur dagin fyri, eftir at hava verið í Cape Town í Suðurafrika at arbeitt upp á eina tyrlu hjá felagnum, hann starvast fyri.

Eg visti bara, at hann arbeiddi sum tyrlumekanikari, so tað er einki at siga til, at eg gjørdist ovfarin tá hann greiddi mær frá, at tað var sjálvur stovnarin (ella í hvussu er annar) av Microsoft, sum var hansara arbeiðsgevari.

Navnið Paul Allen fekk ikki